BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

**Bilradio á Rás2**
Bilradio verður sent hósdag kl. 16.05, fríggjadag kl. 8.05 og leygardag kl. 13.

# Fleiri Toyota nýggjheitir á veg




*Designið á nýggja Avensis er í heilt nýggjum stýli og líkist Lexus*



*Nýggja designið hevur einki til felags við núverandi Avensis*



*Avensis verður gjørdur sum sedan og stationcar*

**Á stóru bilaframsýningini í París vóru nógvar nýggheitir sýndar fram. Á básinum hjá Toyota vóru ikki minni enn tríggjar nýggjheitir, sum koma á marknaðin fyrra hálvár í 2009: Toyota Avensis, iQ og Urban Cruiser**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilaframsýningin í París, sum var frá 4. til 19. september, var karmur um nógvar nýggheitir frá bilverksmiðjum kring allan heim.

Á básinum hjá Toyota vóru ikki minni enn tríggjar nýggjheitir. Tveir heilt nýggir bilar: Toyota iQ og Urban Cruiser, umframt at ein nýggjur Avensis. Allir koma teir á marknaðin fyrra hálvár 2009.

Fyrsti nýggi Toyota sum kemur á marknaðin verður Avensis, sum kemur fyrst í nýggja árinum. Talan er um triðju generatión av Avensis, sum er ein sera týðandi bilur hjá Toyota og ein av teirra mest seldu bilum.

Sum myndirnar sýna, sær tað út til, at Avensis í útsjónd er farin at líkjast luksusbilinum hjá Toyota, Lexus, bæði uttan og innan. Sambært Toyota verður nógv gjørt burturúr bæði hvat kvaliteti og útgerð viðvíkur. Nýggi Avensis kemur eisini við nýggjum motorum sum bæði krafta betur og dálka minni, enn teir sum eru á marknaðinum í dag. Nýggi Avensis verður gjørdur sum sedan og stationcar.

## Toyota iQ og Urban Cruiser

Toyota iQ er ein minibilur, sum er minni enn 3 metrar langur. Sambært Toyota verður talan um tann minsta minibilin til fýra persónar á marknaðinum. Bilurin verður eisini ein av minst dálkandi bilum við einum CO2-útláti upp á 99 gr./ km. Toyota iQ verður fyrsti bilur við airbag til at verja tey sum sita á baksetrinum, um bilurin verður ákoyrdur aftanífrá.

Triðja Toyota nýggjheitin í 2009 verður Urban Cruiser, sum verður ein rúmligur og praktiskur 4x4, ið er nakað minni enn núverandi Toyota RAV4. Enn er ikki likið so nógv út um Urban Cruiser, men vit vita, at hann kemur við 1,4 litra D4-D dieselmotori við CO2 útláti upp á 133 gr/km, og við 1,3 litra bensinmotori.



*Toyota iQ er ein heilt nýggjur minibilur, sum er minni enn 3 metrar langur*



*Toyota iQ verður fyrsti bilur við airbag til at verja tey sum sita á baksetrinum, um bilurin verður ákoyrdur aftanífrá*



*Toyota Urban Cruiser er eisini ein heilt nýggjur 4x4*



*Toyota iQ innan*